## Grand Prix-talv í Klaksvík



Sunnudagin klokkan 14.30 verður farið undir annað umfarið í Grand Prix-kappingini í talvi. Telva verður hesa ferð í fimleikahøllini í Klaksvík, har sjey umfør eru á skránni. Telvararnir fáa her eitt korter í part til hvørt talvið. Kappingin er partur av Grand Prix-kappingini, sum Talvsambandið skipar fyri, og er hartil eisini partur av stóru talv-vikuni í Klaksvík, har GM Klaksvík 100 International verður telvd.

## Ajax tapti slagið um Keypmannahavn

Heini Hanusarson og liðfelagarnir í Ajax Keypmannahavn taptu í gjárkvøldið grannauppgerðini ímóti FCK Håndbold, sum var spæld í Frederiksberghøllini. Endaliga úrslitið gjørdist 31-25 til FCK Håndbold. Donsku fjølmiðlarnir lýstu uppgerðina at verða uppgerðina millum teir ríku í FCK, og teir fátæku hjá Ajax. Hjá Heina Hanusarsyni hilnaðist ikki so illa kortini. Hann fekk fýra mál, og hevur Heini higartil skotið 21 mál í 6 dystum fyri Ajax Keypmannahavn í CBB-liguni, sum besta hondbóltsdeildin í Danmark verður nevnd. Ajax liggur næstaftast í deildini við tveimum stigum fyri seks dystir.

## Ivasamt brotsspark kostaði

**U19: Føroyingar spældu ein góðan dyst, men høvdu ikki neyðugt viðrák í Hvítarusslandi**

FÓTBÓLTUR
*www.football.fo*

- Tað kendist ótrúliga svárt at síggja okkara dreingir tapa dystin. Tað høvdu teir ikki uppiborið, tí teir spældu ein fínan dyst við fleiri góðum málmøguleikum.

Soleiðis sigur Karl Vidtfeldt, FSF-starvsnevndarlimur, og ferðaleiðari hjá U19 dreingjunum, sum eru til EM undankapping í Hvítarusslandi.

Í dag spældi føroyska liðið tann triðja og seinasta dystin á túrinum, og hann endaði 1-0 til vertirnar úr Hvítarusslandi.

Karl Vidtfeldt ásannar, at hvítarussiski sigurin ikki var uppiborin.

- Vit áttu eitt fríspark beint framman fyri teirra brotssteig, og málmaðurin átti eftir okkara tykki at verið útvístur fyri at støðga ein av okkara leikarum. Ístaðin fara hinir í mótálop, og fáa brotsspark, hóast teirra maður varð støðgaður uttan fyri okkara brotssteig. So okkara dreingir vóru rættiliga uppøstir inn á dómaran.

Karl Vidtfeldt greiðir frá, at tað skuldi eitt sindur til at sissa føroyingarnar aftur. Føroyski ferðaleiðarin heldur eisini, at avgerðirnar hjá dómaranum vóru truplar at skilja.

Hvítarussar vunnu sostatt dystin 1-0 upp á brotssparkið, sum teir fingu í øðrum hálvleiki.

Úrslitið fekk tó ikki ávirkan á hvat land kom víðari úr bólkinum, tí Sveis púra óvæntað vann 2-0 á Spania, sum longu hevði tryggjað sær víðari luttøku.

# Nógv størri áhugi nú

**Føroysku fótbóltsáskoðararnir hava verið heldur spakir seinastu tíðina, men formaðurin í 12. manni, Regin Egholm, sigur, at áhugin undan dystinum hesa ferð er munandi størri, enn hann hevur verið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var longu eftir dystin í Malta á sinni, at føroyski 12. maðurin varð skipað sum veruligt áhugafelag. Fram til 2005 ella har á leið var talan eisini um rættiliga aktivt felag, ið var partur av flestu uttanlandsferðum hjá landsliðnum, har tey settu dám á býarmyndina, har spælt varð.

Eisini til heimadystirnar hjá landsliðnum hevur nógv verið gjørt burturúr. Seinnu árini hevur áhugin tó verið dalandi, men formaðurin hjá 12. manni, Regin Egholm, roknar tó við nógvum áskoðarum leygardagin.

- Tað eru í øllum førum nógv, sum hava havt á munni, at dysturin móti Eysturríki í øllum førum er ein dystur, sum tey ætla sær til. So vit rokna við, at áhugin verður nakað væl størri, enn hann hevur verið, sigur Regin Egholm.

Og hvussu fara tit so at fyriskipa upphitingina til dystin?

- Tað verður í Bowlinghøllini á Hálsi, sum jú er tætt við vøllin. Vit eiga annars eitt stórt telt, og upprunaliga ætlaðu vit at nýta hetta, men veðurlíkindini eru eitt sindur óviss, og tí hava vit valt tí tryggu loysnina til hetta. Har fara vit so at hava andlitsmáling, felagssangir og hyggja at Landskrona-dystinum. Og hvør veit, um ikki okkurt gott tilboð eisini verður í barrini, sigur Regin Egholm.




*Føroysku fótbóltsáskoðararnir hita upp í Bowling-høllini, og so eru teir til reiðar at geva landsliðnum sín stóra stuðul frá føstu sitiplássunum við endatribunurnar*

### Alt hongur saman

Hóast eystureuropisk lið sjáldan hava drigið tær stóru áskoðarafjøldirnar til Tórsvøll ella Svangaskarð, so er eingin loyna, at tað var eitt vónbrot við bara 805 áskoðarum til seinasta landsdystin.

Hesi hoyrdust nóg illa kring vøllin, og hóast Regin bæði vónar og ætlar, at ljóðmúrurin verður settur hægri leygardagin, so staðfestir hann eisini, at hetta hongur saman við avrikinum á vøllinum.

- Tað er so nógv, sum spælir inn, so eg fái ikki lovað, at tað verður eitt buldur og brak av okkum. Sjálvandi royna vit at stuðla, men um menninir á vøllinum geva tað, sum vit vilja hava teir at geva, so kemur alt í øllum førum av sær sjálvum. Tað hongur jú saman, so hevur liðið ein ringan dag, smittar hetta helst eisini yvir á áskoðararnar, sigur Regin Egholm.

Og tað tykist eisini, sum hevur Regin vónina um, at liðið fer at geva øllum tað, sum bíðað verður eftir. Í øllum førum er formaðurin í 12. manni bjartskygdur, tá vit spyrja, um hann er til reiðar at koma við sínum boði um úrslitið leygardagin.

- Einum skoti kann eg altíð koma við. Tað kostar so einki. Men vit plaga jú at hava gott tak á Eysturríki, tá vit spæla ímóti teimum, so hví ikki ein tepur 1-0 sigur aftur hesaferð, sigur Regin Egholm.

# Niðurteljingin er byrjað

**Føroyski landsliðshópurin savnaðist í gjár, og seinnapartin hevði liðið sína fyrstu venjing**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað stundar av álvara til landsdystin móti Eysturríki.

Mikudagin um miðdagsleitið hevði Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sett føroysku spælarunum stevnu, og seinnapartin hevði hópurin so sína fyrstu venjing.

Við Rógva Jacobsen millum áskoðararnar, nú hvíld og viðgerð stendur ovast á hansara ynskilista, koyrdi Jógvan Martin Olsen á spælararnar, sum allir hava sæð fram til júst hendan dystin nú í lítið álmanakkaár.

Gitingarnar um lið og uppstillingar eru helst fleiri longu nú, og einki er at ivast í, at Jógvan Martin Olsen eisini hevur sína meining um, hvussu hetta skal síggja út.

Millum tað, sum støða skal takast til, er í øllum førum, at bæði Fróði Benjaminsen og Christian Lamhauge Holst nú aftur eru tøkir. Báðir tveir teljast teir millum avgjørdu lyklaspælararar á landsliðnum, og tí er einki at ivast í, at Jógvan Martin sendir teir á vøllin frá fyrsta bríksli, um venjingastøðan bara so dánt er til tað eftir skaðasteðgirnar.

Hinvegin merkir tað so eisini, at tveir mans skulu út. Skal metast eftir útsagnunum undan dystinum móti Rumenia, so vil landsliðsvenjarin helst sleppa undan at gera rokeringar, og tí kann roknast við, at tað verður mann fyri mann, at skiftast skal, heldur enn at finna upp á kreativar flytingarloysnir.

Tí bendir tað á, at Fróði Benjaminsen verður aftur í miðverjuni, og at Holst kemur inn sum næsti áleyparin, umframt at Jónas Tór Næs fer aftur á bakkin, sum hann røkti so væl frammi til reyða kortið í Beograd.



*Christian Lamhauge Holst, sum stendur ytstur á myndini, er heilt víst ein av brikkunum, ið skal passa til puslispælið, sum Jógvan Martin skal leggja sær til leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*